

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 04 - 2012

# Nýggi Dong-stjórin fær fleiri uppgávur

Tað var ikki hvør sum helst, ið bleiv settur í stjórastólin hjá DONG, eftir at nevndin hevði givið Anders Eldrup sekkin. Avloysarin er eingin annar enn tann 44 ára gamli TDC-stjórin Henrik Poulsen, sum verður mettur sum eitt gullfuglur í danska vinnulívinum. Henrik Poulsen tekur við sum DONG-stjóri tann 1. november, og hansara høvuðsuppgáva verður at tryggja, at DONG varðveitir støðu sína sum nummar eitt í heiminum á havvindmylluøkinum. Ein onnur uppgáva verður at skapa frið um felagið eftir tað nógva og heldur óhepna kjakið í seinastuni. Hóast DONG er danskt, er tað uttanlands, at felagið ger tær størstu íløgurnar. Serliga í Bretlandi, men eisini í Týsklandi, er felagið í holt við ovurstórar íløgur innan havvindmyllur, og tað kemst fyri ein stóran part av, at har eru teir almennu stuðulsmøguleikarnir til grøna orku betri enn í Danmark. Ein avbjóðing, sum tann nýggi stjórin fær at loysa, verður at tálma útreiðslunum hjá DONG, sum eru vaksnar sera nógv í seinastuni. Samanberingar við aðrar orkufyritøkur í Evropa vísa, at lønarútreiðslurnar hjá tí danska felagnum eru millum tær størstu, skrivar DR.